## Auto uttan bensinsølu

Eftir at hava selt bensin í meira enn 50 ár er bensinsølan hjá bilstøðini Auto í Havn latin aftur. Auto hevur øll árini selt bensin alt døgnið, men í dag ber til at keypa bensin við gjaldskorti á flestu bensinstøðunum. Auto hevur selt bensin síðan 1956, tá nýggja støðin, sum var bygd í samstavi við P/F Shell, varð tikin í brúk. Í 1992 var nýggjur sáttmáli gjørdur við oljufelagið Statoil um bensin og oljusøluna. Nú fáa vit eisini betri umstøður uttan fyri støðina, tá bensin- og oljupumpurnar vera tiknar burtur, og vit koma at leggja størri dent á kioskina við t.d. størri vøruúrvali, og koma vit framvegis at veita kundunum okkara eina góða tænastu á høgum støði, sigur Petur Splidt, stjóri í Auto.




## Lærarafelag fingið portal

Síðan aðalfundin í 2006 hevur verið arbeitt fram ímóti, at ein portal fyri alt virksemið hjá Føroya Lærarafelag. Og tað er ikki so lítið, tí umframt sjálvt felagið reka tey eisini Bókadeildina, bókaklubban, Strok, Skúlablaðið og nú eisini Bókamiðsøluna. Hesin portalur er nú komin, og lærarafelagið vónar, at at portalurin fer at vera til mikið gagn hjá lærarum, børnum og øllum teimum, sum hava áhuga fyri skúlaviðurskiftum og bókum.

Kári Petersen, búskaparfrøðingur:

# Tilfeingisgjald gevur pláss til skattalætta

**- Hevði landskassin fingið 300 miljónir krónur fyri veiðirættindi um árið, kundi skatturin hjá hvørjum einstøkum skattgjaldara verið lækkaður við 12.000 krónum um árið. Hjá einum húsarhaldi hevði hetta soleiðis svarað til 24.000 krónur um árið, sum er nógvur peningur at disponera yvir aftrat, sigur Kári Petersen**



*Kári Petersen heldur, at landsstýrið skuldi havt fylgt Búskaparráðnum, sum longu í ár 2000 gjørdi eitt uppskot um eitt nú fiskidagabanka. - Eg haldi, at hetta var eitt gott alit. Høvdu myndugleikarnir havt framt hetta í verki longu tá, hevði landskassin longu havt fingið nógvar miljónir fyri veiðirættindi*

VEIÐILOYVI
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Kári Petersen, búskaparfrøðingur, heldur, at tað, sum hevur verið avgerandi í broytingini í lógini um vinnuligan fiskiskap hesaferð, er, at møguleikin hjá tí almenna at taka pening fyri veiðiloyvi, sum tíðin líður, ikki gjørdist verri, enn hann var fyri lógarbroytingina.

- Vit hava havt væletableraða rættarpraksis, at tá tú keypir skip við loyvum, hava feløg havt brúksrætt – og ikki ognarrætt – til hesi loyvi í eitt ávíst áramál, og tað eru hesi viðurskifti, sum í nýggju broytingini ikki máttu gerast verri.

### Eingi endurgjøld

Eisini var avgerandi í lógarbroytingini, sigur Kári Petersen, at feløg, sum reka vinnu, ikki fáa møguleikan at reisa endurgjaldskrøv móti landskassanum fyri mist ella skerd rættindi.

- Við nýggju broytingini kann landsstýrið skipa so fyri, at veiðiloyvi kunnu takast aftur, tá árið 2017 rennur út. Hesi kunnu tá útskrivast av nýggjum, samstundis sum peningur tá kann takast fyri rættindini, sigur hann.

Kári leggur dent á, at tað, sum var avgerandi at staðfesta í broytingini, var, at tað er landið, sum framvegis eigur rættindini til fiskiríkidømi – at hesi framhaldandi eru ogn Føroya fólks.

### 300 miljónir kr.

Búskaparfrøðingurin vísir á, at nógv skip og loyvir eru "handlaði" seinastu árini.

- Við hesum sølum sum grundarlagi, hevur verið roknað út, at veiðiloyvini eru verd einar 300 miljónir krónur um árið. Hesar miljónirnar eru munur millum tað, sum sjálvi skipini eru verd og tað, sum skip og loyvir eru seld fyri tilsamans. Á henda hátt kanst tú óbeinleiðis rokna út, hvat fiskirættindini eru verd, sigur Kári Petersen.

Orðingin í upprunaliga uppskotinum hjá Bjørn Kalsø um, at loyvið "verður" endurnýggjað, var av fleiri ikki hildin at vera nóg neyv.

Nú er so broytingin hon, at loyvið "kann verða" endurnýggjað – og tað er sambært løgfrøðingunum, sum nú hava úttalað seg um spurningin, avgerandi munurin.

### Størri rásarúm

Kári Petersen sigur, at hevði landskassin fingið 300 miljónir krónur fyri veiðirættindini um árið, kundi skatturin hjá hvørjum einstøkum skattgjaldara – alt annað líka – verið lækkaður við 12.000 krónum um árið.

- Hjá einum hjúnum – ella einum húsarhaldi – hevði hetta soleiðis svarað til 24.000 krónur um árið, og tað er nógvur peningur at disponera yvir aftrat, sum búskaparfrøðingurin tekur til.

Hann heldur, at landsstýrið skuldi havt fylgt Búskaparráðnum, sum longu í ár 2000 gjørdi eitt uppskot um eitt nú fiskidagabanka.

- Eg haldi, at hetta var eitt gott álit, sum Búskaparráðið kom við, og høvdu myndugleikarnir havt framt hetta í verki longu tá, hevði landskassin longu havt fingið nógvar miljónir fyri veiðirættindi.

### Virðismikil loyvi

- Sum eg nevndi, hava seinastu árini víst, at sjálvi loyvini eru nógv verd, tí rættindini eru "handlaði" fyri nógvar hundrað miljónir síðan ár 2000.

Kári vísir á søgur, sum hava gingið um, at eitt nú stórfelagið í Gøtu, sum eigur trý nótaskip, skal hava fingið í boði eina miljard fyri síni skip og loyvi.

- Um hesi tíðindi eru røtt, veit eg sjálvsagt ikki, men eingin ivi er um, at við teimum prísum, sum skip og loyvi eru handlað fyri í seinastuni, eru feløgini hjá Varðanum í Gøtu verd miljardina, sigur hann.

Kári Petersen vísir á, at tá ið Framherji keypti Krúnborg við loyvum fyri einar 350 miljónir krónur, var sjálvt skipið helst vert einar 100 miljónir krónur.

- Hinar 250 miljónir krónurnar eru so fyri tað, sum loyvini eru verd í 10 ár – ella einar 25 miljónir krónur um árið, sigur búskaparfrøðingurin.

# - Roknistykkið er misvísandi

**- Hvussu kunnu teir fáa seg til at rokna við einum marknaðarvirði, ið fiskurin hevur í sjónum, áðrenn fiskimaðurin hevur fingið fiskin í trolið. Vita teir ikki, at tað finst ein útreiðslusíða, og vita teir heldur ikki, at almennar útreiðslur skulu burturav, áðrenn tú nært til botnlinjuna, spyr Føroya Reiðarafelag**

VEIÐILOYVI
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

- Hvussu sleppa menn uppøstir framat í fjølmiðlunum við tølum, sum einki hald hava í veruleikanum. Teir eru raskir at síggja inn í framtíðina og spáa um ríkidømi, ið liggur fyri framman. Hava teir gloymt støðuna í føroyska fiskiflotanum fyri bert tíggju árum síðan, har skip lógu svínabundin, og eingin so mikið sum tordi at eiga skip, ei hevði orku til at váða sær í gongd við vinnu á sjónum.

Soleiðis spyr Føroya Reiðarafelag á heimasíðu síni um dagarnar.

Felagið spyr víðari, hvaðani upphæddirnar koma, ið nevndar verða í miðlunum.

- Maður stendur algoystur í sjónvarpinum og profeterar um 3-10 miljardir í loyvisvirðum tey næstu árini. Jú, roknistykkið er einfalt, men hvaðani koma tølini?

Og lagt verður aftrat á heimasíðuni:

- Búskaparráðið tosar um loyvisvirði fyri skipabólkar, ið als ikki eftir nøkrum seriøsum kalkulatiónum høvdu givið eina positiva tilfeingisrentu.

Felagið setir nógvar spurningar, og ein er, hvussu hesi fólk kunnu fáa seg til at rokna við einum marknaðarvirði, ið fiskurin hevur í sjónum - áðrenn fiskimaðurin hevur fingið hann í trolið.

- Vita teir ikki, at tað finst ein útreiðslusíða, og vita teir heldur ikki, at almennar útreiðslur skulu burturav, áðrenn tú nært til botnlinjuna.

Føroya Reiðarafelag spyr eisini, um tað ikki er komið teimum til hugs, at sama tól skal endurnýggjast, og at íløgur skulu gerast fyri framtíðina.

- Hava teir ikki hoyrt um allýsingina av tilfeingisrentuni, ið ikki er sjálvt talið á botnlinjuni eftir avskrivingar og almennar útreiðslur, men samanburðurin við líknandi vinnu á landi. Hvussu nógvir veiðibólkar høvdu enda skeivu megin nulllinjuna, um roknistykkið var objektivt og ikki manipulerandi, sum Føroya Reiðarafelag tekur til.